# Havnar Hornorkestur fær nýggj horn

**Havnar Hornorkestur hevur keypt musikinstrument fyri umleið ein hálva millión frá Tónastovuni í Sørvági**

TÓNLEIKUR
*Edvard Joensen*

Havnar Hornorkestur hevur keypt 24 nýggj horn av slagnum Boosey & Hawkes – Besson – gjøgnum Tónastovuna hjá John Mouritsen í Sørvági.

John Mouritsen sigur,at talan er um øll instrumentini hjá Havnar Hornorkestri uttan eina es-kornett, sum orkestrið hevur rímiliga nýggja frammanundan.

Millum instrumentini eru tvey euphonium av slagnum »Prestige«, sum avgjørt er toppklassin, sum hann tekur til. Hesi hornini kosta 43.000,- krónur stykkið.

Nýggju hornini skuldu latast Havnar Hornorkesti í



*John Mouritsen , við kornettini, hevur umboðað Boosey & Hawkes í Føroyum í nógv ár*

gjár, og so kunnu tey slítast eitt sindur til, áðrenn tann stóri dagurin er, sigur John Mouritsen við Sosialin.

Tað er í samband við, at Havnar Hornorkestur í næstum fyllir hundrað ár, at orkestrið hevur keypt nýggj instrument, sigur Kári Olsen, sum er formaður í Havnar Hornorkestri. Fíggingin er fingin til vega ymsar vegir, sigur hann.

Havnar Hornorkestur hevur í mong ár hildið til úti á Skansanum, men fer nú at flyta í onnur høli í býnum, sigur Kári Olsen.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og vestri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig,

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn, hitin um 7 stig. Týsdagin hvassur vindur av vestri við ælingi og kaldari veðri.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | ÷2 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 0 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷4 |
| Keypmannah. | ÷4 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | ÷12 |
| Berlin | ÷6 |
| Warzawa | ÷13 |
| Kiev | ÷11 |
| Bukarest | ÷6 |
| Paris | ÷5 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 9 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 4 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 13 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 28 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 30 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1036 hPa vestan fyri Skotland fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, um 990 hPa sunnan fyri Hvarvið fer móti Grønlandsfjørðinum.




Hátrýstið við Írland fer spakuliga suðureftir. Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/01 kl. 06⁰⁰– 09/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,6°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 08/01 kl. 06⁰⁰–09/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 2,5 mm







BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## VESTFALLSKYRRINDI

10. jan.: Fyrra kvarter
11. jan.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 10. jan | — | 12.26 | 11.26 | 23.58 | 11.41 | — | 01.54 | 14.26 | 02.54 | 15.26 | 10.41 | 23.13 | 09.41 | 22.13 | 00.09 | 12.41 | 01.09 | 13.41 | — | 12.11 | 00.54 | 13.26 |
| 11. jan | 00.58 | 13.31 | — | 12.31 | 00.13 | 12.46 | 02.58 | 15.31 | 03.58 | 16.31 | 11.46 | — | 10.46 | 23.20 | 01.13 | 13.46 | 02.13 | 14.46 | 00.43 | 13.16 | 01.58 | 14.31 |
| 12. jan | 02.05 | 14.23 | 01.05 | 13.23 | 01.20 | 13.38 | 04.05 | 16.23 | 05.05 | 17.23 | 00.20 | 12.38 | 11.38 | 23.56 | 02.20 | 14.38 | 03.20 | 15.38 | 01.50 | 14.08 | 03.05 | 15.23 |
| 13. jan | 02.41 | 14.59 | 01.41 | 13.59 | 01.56 | 14.14 | 04.41 | 16.59 | 05.41 | 17.59 | 00.56 | 13.14 | — | 12.14 | 02.56 | 15.14 | 03.56 | 16.14 | 02.26 | 14.44 | 03.41 | 15.59 |

5 707265 100050 >